Bjarni Hammer
løgtingsmaður

Nr. 32/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a
Fyrispurningur um ferðaseðlakostnað, settur landsstýrismanninum í samferðslumálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá kostnaðinum fyri ávikavist fimm fólk í einum bili, sum ferðast gjøgnum Vágatunnilin og fimm fólk í einum bili, sum ferðast við Smyrli?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at avtaka tunnilsgjaldið fyri at koyra gjøgnum undirsjóvartunlarnar?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at lækka ferðaseðlaprísirnar við oyggjaleiðum, soleiðis at teir verða á sama støði, sum ferðaseðlaprísirnir fyri at koyra gjøgnum undirsjóvartunlarnar?
4. Um landstýrismaðurin ætlar at avtaka tunnilsgjaldið, ætlar landstýrismaðurin so eisini at avtaka ferðaseðlaprísirnar við oyggjaleiðum?

Viðmerkingar:
Í desembur mánaði 2002 varð koyrandi gjøgnum Vágatunnilin. Í apríl mánaði 2006 varð koyrandi gjøgnum Norðoyatunnilin. Skjótt verður koyrandi gjøgnum Eysturoyartunnilin og um fá ár eisini Sandoyartunnilin.
Samferðslukervið er nógv útbygt seinastu árini, oyggjar, býir og bygdir eru knýttar tættari saman. Men Suðuroyggin er framvegis fjarskotin, sum tann einasta av teimum størru oyggjunum.
Ætlanirnar um at gera ein Suðuroyartunnil hava verið umrøddar, álit um fyrimunir og vansar er skrivað, men væntandi verður í fyrsta lagi koyrandi til Suðuroyar í 2030, um peningurin verður settur av og arbeitt verður skjótt. Tí er neyðugt við góðum sjóvegis ferðasambandi í nøkur ár afturat, sum er á støði við annan ferðakostnað í Føroyum.
Landsstýrisfólk, løgtingslimir og fjølmiðlar hava seinastu tíðina umrøtt ætlanir um at avtaka tunnilsgjøldini gjøgnum undirsjóvartunlarnar. Um ætlanin er at avtaka kostnaðin fyri at ferðast gjøgnum undirsjóvartunlarnar uttan at lækka ferðaseðlakostnaðin við oyggjaleiðum samsvarandi, verður enn størri munur á ferðakostnaðinum hjá fólki kring landið.
Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 4. desember 2019

Bjarni Hammer